

Elin Henriksen

Kjak

# 1250 kr. um árið

**– tað er lestrarstuðulin til heimabúgvandi 18-19 ára gomul, sum vaksa upp hjá støkum uppihaldarum**

Í øllum orðaskiftinum um lestrarstuðul er ein bólkur dottin burturímillum. Tað eru børn hjá støkum uppihaldarum. Gjaldið frá hinum foreldrinum, sum er 12.550 kr. um árið, fellur burtur, uttan so at viðkomandi hevur óvanliga høga inntøku. Somuleiðis fellur almenni stuðulin til stakar uppihaldarar, 6.000 kr. um árið, burtur. Tilsamans 18.550 kr.

Lestrarstuðulin verður settur niður til 1.800 kr. um mánaðin, 11 mánaðir um árið, tilsamans 19.800 kr. um árið. Tað, sum er eftir, er sostatt 1250 kr. um árið.

Barnafrádrátturin í kommunuskattinum, sum er eitt sindur ójavnur, umleið 5.000 kr. um árið, fellur burtur. Barnafrádrátturin í landsskattinum, 5.500 kr. um árið, fellur somuleiðis burtur. Lestrarstudningur kann síggjast sum ein máti at viga upp ímóti hesum inntøkumissi, men tað er bara ikki galdandi fyri familjur við støkum uppihaldara. **Samanlagt minkar inntøkan hjá familjuni við støkum uppihaldara við 9.250 kr. um árið, tá ið barnið fyllir 18 ár,** um tað framvegis gongur í skúla.

Áðrenn tann ungi fylti 18 ár, varð upphæddin frá hinum foreldrinum ("pápapengarnir") drigin frá tí, sum hann kundi forvinna, áðrenn hann skuldi rinda skatt. T.v.s. at hann rindaði skatt av tí, hann forvann í summarfrítíðini, meðan javnaldurin við liðina á honum, sum vaks upp hjá tveimum foreldrum, ikki skuldi rinda skatt av somu inntøku.

Tað sæst, at tey, sum hava gjørt broytingarnar í lestrarstudninginum, hava skeitt eftir donskum reglum, har grundstuðulin til heimabúgvandi á miðnámsútbúgvingum er 1.200 kr. um mánaðin. Men har er bara tann munur, at tey fáa eitt ískoyti, sum er lagað eftir foreldrainntøkuni, og er hon 300.000 kr. ella minni, er hetta ískoytið knappar 1.500 kr. um mánaðin. T.v.s. at lestrarstudningurin hjá einum 18-19 ára gomlum heimabúgvandi miðnámsskúlanæmingi í DK, ið er barn hjá støkum uppihaldara við vanligari løn, er 2.650 kr. um mánaðin. Munurin vigar sostatt upp ímóti tí upphædd, sum familjan við støkum uppihaldara missir í Føroyum, tá ið barnið fyllir 18 ár. (Meðan lestrarstudningurin í DK er skattskyldugur, minkar hann í Føroyum samsvarandi inntøkuni hjá móttakaranum.)

Um feilir eru í hesum útrokningum, vóni eg, at onkur rættar teir. Annars fari eg bara at spyrja, hvussu leingi hesin mismunur á børnum, ið vaksa upp hjá støkum uppihaldaram, og børnum, ið vaksa upp hjá tveimum foreldrum, skal halda fram.


## LEIÐARI TIL DAGSTOVN

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara til Dagstovnin á Hamrinum 40 tímar um vikuna at byrja 1. januar 2011.

Stovnurin er skipaður við tveimum vøggustovum, 26 børn, og tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum, og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving
- tú verður partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðararnar

**Vit vænta at tú**
- ert útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum stovni, ið rúmar bæði vøggustovu og barnagarðsbørnum
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- sær møguleikar framum vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- hevur lætt við at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
Saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum, skal vera hjá Tórshavnar kommunu, Vaglið, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 16. november 2010.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóra, tlf. 302010, ella Katrina Petersen, deildarleiðara, tlf. 302010/214032.

## PEDAGOGUR

Tórshavnar kommuna søkir vegna Vøggustovuna Reiðrið eftir einum pedagogi at arbeiða 30-40 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera hjá Reiðrinum, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 15. november 2010.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Joan Simonsen, leiðara, tlf. 214048, ella Sólvá Sondum, varaleiðara, tlf. 214049.

**Onnur størv í Tórshavnar Kommuna – Lesið meira á www.torshavn.fo**

**Fysioterapeutur** – Tjarnargarður
Umsóknarfreist 08.11.2010

**Pedagogur** – Stalla Maris Vøggustova
Umsóknarfreist 29.11.2010

**námsfrøðiligir ráðgevarar** – Barna- og ungdómsdeildin
Umsóknarfreist 08.11.2010

**Pedagogar** – Dagstovnin í Øksnagerði
Umsóknarfreist 01.11.2010

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA